# Vísukonsert umborð á Høganesi



*Konsertin við Kungälvnæmingunum umborð á Høganesi verður í kvøld kl 20*

**Kungälv-næmingar vitja í Runavík í kvøld**

KONSERT

Í kvøld verður vísukonsert umborð á sluppini Høganesi í Runavík við einum fýramannabólki av vísulinjuni á fólkaháskúlanum í Kungälv í Svøríki.

Bólkurin, ið telur tríggjar sviar og føroyingin Kjartan Hansen, vitjar í Føroyum í døgunum frá 8. til 14. mars. Seinasta framførslan á ferðini verður leygarkvøldið umborð á Høganesi.

Á skránni eru egnar tulkingar av bæði kendum og ókendum sangum. Harumframt er eitt sindur av egnum tilfari, har tey hava lagt seg eftir at spæla mest norðurlendskan tónleik og framføra á fleiri norðurlendskum málum; tó er okkurt enskt ímillum.

Bólkurin spælir mest sum alt frá svenskum fólkatónleiki við fiólini í hásæti, til Tom Waits og Johnny Cash. Grundarlagið er tekstborin tónleikur - vísur.

Vísulinjan á Norðurlendska fólkaháskúlanum í Kungälv er skipað á tann hátt, at hon tekur eitt ár og høvuðsevnið er vísutónleikur. Í stuttum ber til at siga, at tað snýr seg mest um at tulka vísur; at læra hvussu tú kanst framføra og variera, bæði hvat tí tónleikarliga viðvíkur og sjálvari framførsluni.

Svøríki hevur eina langa tradition í vísutónleiki, har tekstboðskapurin og harvið sambandið millum framførara og áskoðara er sjálvt grundarlagið.

Undirvísingin gongur fyri seg í »masterclass«, ið merkir at tú arbeiðir individuelt við læraranum, meðan restin av flokkinum eru áskoðarar. Ein lutur í undirvísingini er, at farið verður á turné í tvær vikur í smærri bólkum. Tað er í hesum sambandi, at bólkurin hevur leitað sær til Føroya hesa vikuna.

Konsertin byrjar klokkan 20.


Starvsfólk

til Sunset Boulevard í SMS



**Aftaná skúlatíð**

Søkt verður eftir fólki M/K at arbeiða nakrar tímar um vikuna - eftir skúlatíð og í vikuskiftunum - at byrja skjótast tilber. Eitt sera vælegna starv hjá teimum lesandi.

Ert tú opin, virkin og røkin, so ert tú kanska ein av teimum, vit leita eftir. Vit vænta, at tú eins og vit eru tilreiðar at veita kundum okkara eina skjóta og góða tænastu.

Vit læra teg á staðnum...

**Hálva tíð**

Søkt verður fólki M/K at arbeiða hálva tíð - um dagin, kvøldið og í vikuskiftunum - at byrja skjótast tilber.

Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða við fólkum, so er hetta júst nakað fyri teg. Tú gerst partur av einum vælleikandi liði við nógvum starvsfólkum í einum nógv vitjaðum umhvørvi.

Vit læra teg á staðnum...

**Fulla tíð**

Søkt verður fólki M/K til fulltíðarstarv - at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir og eftir hetta gerst tú eitt av álitisstarvsfólkum okkara. Vit gleða okkum at hoyra frá tær...

**Send umsóknina til:** Sunset Boulevard, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn.
Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. apríl 2004.

Sunset Boulevard • SMS • Postboks 1059 • FO-110 Tórshavn

petur & petur • 320870


## Grækarismessuhald í Klaksvík

Klaksvíkar Hornorkestur skipar fyri Grækarismessuhaldi í Klaksvík. Vanligt er, at haldið er tann nærmast sunnudagin við sjálvan Grækarismessudag, og í ár er onki undantak.

Skrúðgonga við hornorkestri og skótum fer frá býráðshúsinum sunnudagin klokkan 14.30 heim í skúlagarðin í Ósáskúlanum, har Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa flytur fram røðu og heilsu til tjóðfugl okkara. Eisini spælir hornorkestrið nøkur løg og onkrar marsjir.

Skótarnir verða bidnir um at møta í hølum teirra klokkan 14 sunnudagin.

-sae-

## Sosialur kapitalur

Granskingardepilin fyri Økismenning gevur út Námsrit 4/2004 Sosialur kapitalur – við støði í Robert D. Putnam, sum samfelagsfrøðingurin Martha H. Mýri hevur skrivað. Námsritið er í pdf-formati á heimasíðu Granskingardepilsins, www.region.fo undir Útgávur og Námsrit

»Sosialur kapitalur« er eitt heitt evni innan samfelagsgransking í dag. Granskarar eru komnir fram til, at vitan, útbúgving og pengar ikki eru nokk í sær sjálvum, men at tey sosialu sambondini hava størri týdning fyri t.d. nýskapan, heilsu og menning, enn hildið hevur verið frammanundan.

Eitt enskt orðatak sigur soleiðis: »It's not what you know, it's who you know«, tað, sum hevur týdning, er ikki hvussu nógv tú veitst, men hvønn tú kennir.

Hví eru hesi sosialu sambondini so týdningarmikil? Og hvussu kunna tey sosialu sambondini vera eins ella enntá meira týdningarmikil enn eitt nú búskaparligur kapitalur?

Hesir spurningar verða millum annað viðgjørdir í Námsritinum.

## List á Jinx

Frá 1. apríl fara tey á Jinx at skifta prýðið á veggunum út hvønn mánað millum ymisk listafólk.

– Hetta konseptið, sum tey í Danmark kallað »Månedens kunstner«, verður nógv brúkt á café'um í londunum kring okkum. So nú halda vit, at tíðin er komin at royna tað hjá okkum eisini, siga tey á Gallarí Jinx.

– So er tú ein av okkara mongu talentum, sum ikki rættiliga hevur fingið fótafesti enn og hevur tú áhuga at vísa fram í hølinum hjá Gallarí Jinx, so set teg í samband við okkum, sigur Florence Skipagøta, stjóri á Gallarí Jinx.

Hon sigur, at tað ikki er ein treyt, at talan skal vera um málningar. Tað kann eisini vera talan um myndir, klipp ella annað, ið kann hanga á veggunum, sigur Florence, ið samstundis nýtir høvi at takka Lone Mørkøre, sum hevur prýtt veggirnar, síðani Gallarí Jinx læt upp síðsta summar.



# – Gloym útlendskan kapital til alivinnuna

**Tað verður torført at fáa útlendingar at seta pening í føroyska alivinnu, meinar ráðgevin Rúni Dam, og peikar á tann føroyska kapitalmarknaðin sum upplagt alternativ**

ALIVINNA

*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

– At tveita fyri borð tann í peningi, vitan og arbeiðstíð sera dýrtkeypta farm sum føroysk alivinna umboðar, hevði ikki bert verið ein beiskur biti fyri mong; tað hevði búskaparliga og sosialt eisini verið ábyrgdarleyst, serliga tá hugsað verður um, at tað finnast kassar innan føroyska fíggjarvinnu, ið standa til at bresta av akkumuleraðum peningi - ein hóttanarmynd, ið við tíðini gerst meira og meira verulig, alt vegna nakrar fáar milliónir í gjaldføri, sum resta í hjá alibrúkunum fyri at fáa vársmoltið sett út nú í næstum.

So sigur ráðgevin Rúni Dam, sum í nógv ár hevur starvast innan føroyska alivinnu, og hvørs benchmarking fyritøka, Avrik Spf, herfyri gav út »Ársfrágreiðing fyri 2003 – Hagtøl úr Alivinnuni«.

Rúni Dam meinar, at alt tos um útlendskan kapital til alivinnuna er órealistiskt í løtuni orsakað av støðuni sum hon er, nevniliga av tí at tað kann vera torført at fáa útlendskar íleggjarar innan stutta tíð at skilja potentialið hjá hesari vinnu.

– Tað verður tosað um, at vit mugu loyva útlendskum íleggjarum at seta pening í føroyska alivinnu og alt gott um tað, viðmerkti Rúni Dam.

– Trupulleikin er bara, at vinnan er í álvarsligum trupulleikum; fyri ein íleggjara at trúgva upp á verkætlanir í hesari vinnu krevst, umframt at hann hevur váðafúsan kapital og er til reiðar at satsa upp á nakað, ið ikki verður roknað sum serliga trygg íløga… so má hann vera rættiliga kunnigur um føroyska alivinnu og hennara fyritreytir, umstøður og møguleikar – fyri at hann yvirhøvur skal kunna síggja meining í at seta pening í. Alt hetta tekur longri tíð, enn okkara kreppurakta alivinna kann bíða eftir.

– Samstundis finnast á tí føroyska kapitalmarknaðinum nógvar hundraðtals milliónir krónur uppsamlaðar, og ein partur av hesum hevði í prinsippinum kunnað verðið innskotin í alivinnuna.

Spurdur um hann sipar til ávísar fíggjarstovnar, svarar ráðgevin játtandi tó uttan at útpeika nakran við navni.

– Tað skerst ikki burtur, at ávísir peningastovnar hava fíggjað stórar partar av okkara alivinnu, men tað finnast eisini aðrir stovnar… sum sita á risastórum peningaupphæddum, men kanska ikki altíð vita, hvat teir skulu gera við hendan kapital. Eg havi tosað við leiðandi fólk har sum eisini taka í álvara sína ábyrgd at fara skilagott um allan hendan pening, sum hetta samfelagið hevur latið teimum at umsita. Men okkurt bendir á, at stirvnar mannagongdir steðga neyðugari nýhugsan…

Sum skilst er tað beint nú um at gera hjá alarum at fáa vársmoltið til høldar; verður einki sett út í apríl-mai, so merkir tað, at biomassin minkar so mikið, at tað kann gera enda á einum stórum tali av alibrúkum. Hesin vandi tykist nærliggjandi í løtuni orsakað av, at gjaldførið hjá flestu alibrúkum er lítið og einki, aftan á at eginpeningurin er uppetin av teimum trupulleikum, sum hava herjað tey seinastu tvey-trý árini.



*Rúni Dam meinar, at alt tos um útlendskan kapital til alivinnuna er órealistiskt í løtuni orsakað av støðuni sum hon er, nevniliga av tí at tað kann vera torført at fáa útlendskar íleggjarar innan stutta tíð at skilja potentialið hjá hesari vinnu.* Mynd: Jens Kristian Vang

# Eingin rentuhækking í bræði

**Trupulleikar á amerikanska arbeiðsmarknaðinum hava við sær, at tjóðbankin har hevur útsett ætlaðu rentuhækkingina**

FÍGGJARHEIMURIN

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hetta sigur virðisbrævameklarafelagið, Kaupthing, í seinastu útgávuni av Útlit og Rák.

At eingin ræntuhækking verður framd í USA her og nú speglast eisini aftur í europeiska fíggjarheiminum, har tað annars varð roknað við, at tjóðbankarnir á meginlandinum høvdu fylgt eini amerikanskari rentuhækking.

At støðan á amerikanska arbeiðsmarknaðinum er somikið vánalig, hevur eisini havt ávirkað láns- og gjaldoyramarknaðirnar. Støðuga rentutlækkingin, sum hevur verið framd seinastu tíðina hevur flutt áhugan hjá íleggjarum yvir móti statslánsbrøvum, og hetta hevur viðført stórt kursfall fyri onnur lánsbrøv.

Fyri partabrøv hevur støðan í USA hinvegin havt positivan týdning. Fleiri av stóru virkjunum hava framt stór inntriv, sum hava betra úrslitini, og samstundis hava ótryggu viðurskfitini skapt ein øktan handil.

Kaupthing sigur seinasta í tíðindabrævinum, at tað er trupult at meta, um hendan gongdin fer at halda fram. Psykologiska effektin á marknaðinum kann skjótt fáa sveiggini báðar vegir, og tí verður í løtuni rátt til, at íløgurnar verða spjaddar og fyrst og fremst settar í trygg partabrøv, har góð útlit fyri einum rímiligum vøkstri upp á longri sikt.





I·net BREIÐBAND

| Nýtslutørvur | Nýtslumynstur | Prísur pr. mðr. | Ferð | Frí nýtsla |
|---|---|---|---|---|
| Lágur | Surf, postur, chat og spæl | Kr. 280,- | 256k/128 | Eingin. 50 oyru/Mbyte. |
| Miðal til stórur | Surf, postur, chat, spæl og tónleikur | Kr. 595,- | 512k/128 | 2 Gbyte. Yvir 2 Gbyte: 50 oyru/Mbyte. |
| Stórur | Surf, postur, chat, spæl, tónleikur og filmur | Kr. 895,- | 1024k/128 | 3 Gbyte. Yvir 3 Gbyte: 50 oyru/Mbyte. |

Vanligur prísur fyri stovning er kr. 750,-

**Bíleggið nú og sparið kr. 750,-*) í stovning**

- Upp til 20 ferðir skjótari enn uppringt samband
- Støðugt fast samband
- Tosa og surfa samstundis - ikki neyðugt við eyka linju
- Fleiri upplivingar á alnetinum

**Ring 808080, vitja www.tele.fo ella eina telebúð og fá I·net Breiðband til júst tín tørv...**

*) Treytað av at tú teknar I·net breiðbandhald frá Føroya Tele í 6 mðr. Tilboðið er galdandi til og við 31. mai 2004. Montørgjald og mótald, ið kann keypast frá Føroya Tele, er ikki íroknað. Sí meira á www.tele.fo.

FØROYA TELE

petur & petur • 320870